# TILTØK

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Tríggir einglar, hvør við sínum boðskapi. Kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin. Kl. 21 Útimøti. Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardagin eingin sunnudagsskúlaútferð vegna jarðarferð.
Sunnudagin kl. 11 Møti, oberst Laila og Harald Pettersen tala, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti, major Gunnvor Lilledarange (f. Langen) talar, onnur vitjandi úr Noreg luttaka. Drekkamuður aftaná møti, øll eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 hevur sunnudagsskúlin hugnaløtu fyri alla familjuna, um viðrar. Kl. 18 Møti við Sunnuvu og Hans Jacob.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti v/ Alex O'Campo.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Meinigheitshúsið, Tórshavn**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Bergur í Garði.
Mikudagin 19. juni kl. 20 Húsmøti hjá Meiken og Karl Michelsen, Undir Gráasteini 5, Tórhsavn. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 18 Møti við Leo-Hans Mikkelsen.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Hellurnar og Oyndarfjørður**
Leygardagin hevur Heimamissiónin útimøti á Hellunum kl. 19 og í Oyndarfirði kl. 21.

**Berøa, Saltangará**
Sunnudagin kl. 11.30 Breyðbróting og sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.

**Lívsins Orð**
Leygarkvøldið kl. 19 verður sangløta á tivoliøkinum í Runavík við luttøku av manskórinum í Evangeliihúsinum. Sunnudagin kl. 10.30 verður møti við Eliezer Braun og Moses Hansen, kl. 18 verður Sangløta á tivoliøkinum. Mánakvøldið kl. 20 møtir Ungdómsbólkurin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Dánjal Petersen. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj. Kl. 11 Barnamøti.
Útimøti á Eystanstevnu kl. 17. Mánadagin 17. juni kl. 20 Vitjan úr Ísrael saman við Moses Hansen. Vælkomin í Kelduna www.keldan.fo

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli. Einki møti verður vegna útferð til Viðareiðis. Ungdómsmøti verður kl. 21.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 18 Møti. Mánadagin kl. 20 Bønarmøti. Týsdagin 18. juni kl. 20 Møti við Moses Hansen, Eliesar Braun og Hjalmar Svennevig.

**Missiónshúsið í Skopun**
Um viðrar fer sunnudagsskúlin útferð til Húsavíkar. Farið verður frá Missiónshúsinum kl. 14.00, havið matpakka við. Kl. 17.30 Lovsongs- og bønarmøti, kl. 18 Møti.

**Café One Way, Tvøroyri**
Ian úr USA og Sille úr Norra skipa fyri ungdómshugna mikukvøldið, hóskvøldið og fríggjakvøldið. Øll kvøldini kl. 20. Onki aldursmark. Onskvøldið luttekur dansibólkurin.
Tórskvøldið verður filmur vístur fríggjakvøldið frá kl. 20. »Surprise Evening«!

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Karl og Elidu Kenning. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Bíbliudagur í Øravík**
Sunnudagin 16. juni verður bíbliudagur á Gistingarhúsinum í Øravík við heitinum »Latið okkum geva gætur hvør eftir øðrum«. Luttakarar verða Hj. Vang, Sv. av Lofti, P. J. Djurhuus, P. á Lakjuni og J. P. Sevdal. Tekning hjá Poul Jóhan Djurhuus, Glyvrar, tlf. 448314. Alment møti verður kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 18 Møti, øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 10. juni*
kl. 9.4-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Ítriv. Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobbspæl, dart og onnur spøl.
Tilmelding til døgurðan mikudagin, tlf. 316491
*Týsdagin 11. juni*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 16 **Kvøldseta**
Kór eldri borgara á Akureyri syngja, Helga H. Gerðalíð spælir á flygil, Jóhan H. W. Poulsen hevur orðið. Felagssangur.
*Mikudagin 12. juni*
kl. 10-13 Matgerð
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur
Sjá skránna í bløðunum
*Hósdagin 13. juni*
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Hugnaløta
*Fríggjadagin 14. juni*
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 16. juni verður gongutúrur: Saksun-Skoradalur-Kopenni. Farið verður Kunningarstovuni kl. 9.00. Hetta er tungur túrur í brattlendi, gingið verður í uml. 7 tímar. Tilmelding. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20.00–21 og 22.30-23.30.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvønn leygardag kl. 17.00 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF**
Íslandsvegur 10C
100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo


## Almanna- og heilsuútbúgvingin í Suðuroy

**800 Tvøroyri**

søkir eftir áhugaðum tímaløntum lærarum at undirvísa heilsuhjálparanæmingum. Tú skalt hava eina miðallanga framhaldsútbúgving, sum er viðkomandi fyri útbúgvingarnar, t.d. sjúkrasystir, fysio-/ergoterapeut e.l.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og mennandi starv, har tú kemur at arbeiða sjálvstøðugt í tínari undirvísing. Undirvísingin er løgd til rættis sum toymisarbeiði og sum verkætlanir, í tøttum tvørfakligum samstarvi ímillum lærararnar á skúlanum.

Undirvísingin tekur støði í 5 yrkislærugreinum, ið eru tann: handaliga, mentanarliga, virksemisskapandi, námsfrøðiliga/sálarfrøðiliga, almanna/samfelagsliga og røktarliga yrkislærugreinin, við 20% úr hvørjari grein.

Á skúlanum starvast frammanundan ein sjúkrasystir, ein kostráðgevi og ein fysioterapeutur.

Áhugað kunnu venda sær til skúlan á tlf. 372855, Susanne Høgh Olesen, deildarleiðara, skjótast gjørligt.

## Sethús í Trongisvági



Sethús í Trongisvági til sølu.

**Tlf. 372071 eftir kl. 18**
**ella tlf. 0045 24232278**

## Skálavíkar skúli

**søkir eftir lærara til skúlaárið 2002/2003**

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv, 10 tímar um vikuna, til Skálavíkar skúla skúlaárið 2002/2003.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálstýrið.

Umsóknir við prógvi og møguligum viðmælum skulu sendast til Skúlastýrið fyri Skálavíkar skúla í seinasta lagi 21. juni 2002.

**Skúlastýrið fyri Skálavíkar skúla**
Att. Signhild Jacobsen
220 Skálavík




# FILMSTEIGURIN

## Collateral Damage – Køld Hevnd

Ein fagran summardag fyrrapart missir sløkkiliðsmaðurin, Gordy Brewer (Arnold Schwarzenegger) konu sína og lítla sonin, tá ein terrorbumba brestur uttan fyri eina friðarliga café í miðbýnum í Los Angeles. Myndugleikarnir lova, at einki verður spart til tess at finna teir seku. Men sum vikurnar ganga, sær Gordy, at sakin er um at drukna í politikki. Tann mistonkti, El Lobo, Úlvurin, (Cliff Curtis) er ein kolumbianskur uppreistrarmaður, sum vil flyta ólukkuliga borgarakríggið í Kolumbia til USA. Beint ímóti øllum ráðum og ordrum, fer Gordy ú tá sína egnum missión: tum um eingin annar vil seta Úlvin til svars fyri gerðir sínar, so má hann sjálvur gera tað. Jagstranin fer í gongd í borgarakríggjherjaðu frumskógini í Kolumbia og heldur fram í Washington DC í einum hárreisandi kapping við tíðina…



Actionhetjan, Arnol Schwarzenegger hevur høvuðsleiklutin í hesum spenningsfilminum, sum Andrew Davis hevur leikstjórnað.

Við í filminum eru eisini t. d. Elias Koteas (»Thin Red Line«), John Leguizamo (»Moulin Rouge«), John Turturro (»O Brother, Where Art Thou«) og Frencesca neri (»Hannibal«).



## Kate & Leopold

Kate & Leopold er ein herlig og romantisk komedia við vøkru Meg Ryan og tí lekra Hugh Jackmann í høvuðsleiklutunum. Meg Ryan spælir Kate, ein karrieruáhugað støk genta frá New York, sum fullkomiliga hevur uppgivið at møta Mr. Right. Men so dukkar tann sjarmerandi og galanti Leopold, herugi av Albany, upp og vendir øllum á høvdið…

Tey leikandi í filminum eru: Meg Ryan, Hugh Jackman, Liev Schreiber, Breckin Meyer og Natasha Lyonne.





**Frumsýning**
Fríggjadagin 14.06. kl. 20$^{30}$ Leygardagin 15.06. kl. 20$^{30}$
Sunnudagin 16.06. kl. 20$^{00}$




Fríggjadagin 14.06. kl. 21$^{00}$ Leygardagin 15.06. kl. 18$^{30}$
Sunnudagin 16.06. kl. 20$^{30}$

**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**




**Frumsýning**
Fríggjadagin 14.06. kl. 23$^{00}$ Leygardagin 15.06. kl. 23$^{00}$
Sunnudagin 16.06. kl. 22$^{30}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**




Fríggjadagin 14.06. kl. 18$^{30}$ Leygardagin 15.06. kl. 23$^{30}$
Sunnudagin 16.06. kl. 18$^{00}$




Fríggjadagin 14.06. kl. 23$^{30}$ Leygardagin 15.06. kl. 21$^{00}$
Sunnudagin 16.06. kl. 23$^{00}$

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning Fríggjadagin 21.06.**